# Teldutókt Undirvísingartilfar



**KT-varðauppgávan 2004**

**Ingun Simonsen**

## Innihaldsyvirlit

| | | |
|---|---|---|
| **Teldutókt undirvísingartilfar** | **síða** | **3-5** |
| **Problemformulering** | **síða** | **6-7** |
| **Telduforrit** | **síða** | **8-17** |
| **Undirvísingartilfar** | **síða** | **17-18** |
| **Teldutókt undirvísingartilfar** | **síða** | **19** |

- ***Náttúra og Tøkni*** ***síða 2o***
- ***Føroyskt*** ***síða 20***
- ***Tilevning*** ***síða 20***
- ***Tónleik*** ***síða 21***
- ***Myndlist*** ***síða 21***

| | | |
|---|---|---|
| **Eftirmeting** | **síða** | **24** |

# Teldutókt undirvísingartilfar

## Teldutókt undirvísingartilfar

Teldan er sum so eitt nýtt amboð í skúlahøpi, hon hevur ikki meir enn gott 20 ár á baki í almennum høpi. Í undirvísingarhøpi hevur hon ikki meir enn gott 5-6 ár og tað er ikki nógv, sammett við skúlan, sum hevur meir enn 100 ár á. Amboðini, ið brúkt hava verið gjøgnum hesi mongu ár hava verið griffil, krit, bøkur, kort og hefti. Skriviamboðini hava øll verið manuel líka fram til sjeytiárini, tá ið skrivimaskinan varð tikin í nýtslu.

Í undirvísingarhøpi er teldan eitt sera hent amboð um hon verður brúkt rætt, soleiðis at skilja, at tað nyttar einki bert at lata næmingar fara til telduna og so halda, at nú kunnu teir sita har sjálv. Eins og við øllum øðrum amboðum er neyðugt at læra hvussu tað skal brúkast og hvat tað kann brúkast til. Nærum alt kann gerast á einari teldu og nærum allir upplýsingar, ein hevur brúk fyri, kann ein finna á telduni antin í forritunum ella á alnótini.

Eg havi valt at arbeiða við teldutøkum undirvísingartilfarið á føroyskum og tað er við vilja. Føroyskt duga bert føroyingar og vit eru fáment, bert eini 48000 menniskju. Og skulu okkara børn og ungu kunnu sammetast vit onnur ung er neyðugt at vit eisini fylgja við í útviklingini, sum beint nú gongur við stormandi ferð, serliga innan KT.

Av tí at vit eru so fáment, finst ikki nær til so nógv vanligt undirvísingartilfar sum á øðrum málum. Td. í donskum, sum vit ofta sammeta okkum við, hóast Danmark í altjóða høpi eisini verður roknað sum "lítlið", finst rættiliga nógv gott undirvísingartilfar, sum vit her í Føroyum eisini brúka tá ið hugsað verður um lærugreinina danskt.

Havandi í huga, at lítið og einki teldutókt tilfar finst í lærugreinini føroyskt, havi eg sett mær fyri at kanna hvat kann gerast til tess at betra um hetta.

At tað er sera kostnaðarmikið og tíðarkrevjandi at gera tílíkt tilfar, kann lítil ivi vera um. Vit eru fáment og hava tí ikki tær resursir onnur lond hava. Men er tað nú so dýrt hóast alt ? og er tað so tíðarkrevjandi at eingin fæst til at gera hetta. Hetta havi eg sett mær sum mál fyri at kannað. Eg fari at hyggja eftir onkrum útlendskum forritum, ummæla tey og vita um tað ber til at føroyska tey fyri ein sámuligan prís og ikki minst vita um tey yvirhøvur eru egnaði í føroyska fólkaskúlanum.

Ein ørgrynna er til av útlendskum forritum og stundir eru ikki til at umæla tey øll, men eg havi valt nakað burturúr. Okkurt er sera áhugavert og okkurt minni.  At enda eru fleiri link, har fólk sjálv, um tey hava áhuga, kunnu fara inn at leita eftir øðrum forritum. Fleiri av hesum forritum eru eftir mínum tykki sera áhugaverd og kunnu brúkast sum tey eru í fleiri lærugreinum, s.s. søgu, landalæru o.a. Við á tilfarslistan havi eg valt at tikið ummælið av forritum aðrir Kt-vørðir hava gjørt, tí tað skuldi ikki verið neyðugt at ummælt sama forrit fleiri ferðir. Her verða tey savnaði og hevur onkur brúk fyri teimum, eru tey savnaði á einum ávísum stað.

At eg havi valt føroyskt og myndlist kemst sjálvsagt av, at í hesum lærugreinum finst alt ov lítið av undirvisingartilfarið yvir høvur og tá ið eg sigið hetta, meini eg sjálvsagt eisini við bøkur, bløð, bond og filmar. Orsøkin kann vera, at tað er tíðarkrevjandi og kann eisini vera at tað er kostnaðarmikið at gera undirvísingartilfar til so fá fólk. Teldutókt undirvísingartilfar kann møguliga hjálpa uppá hesa støðuna, tí teldutókt tilfar er nakað annað enn bøkur. Tað skal ikki prentast og til ber at redigera meðan forritið verður gjørt, tí kann tað koma til at kosta minni enn teir undirvísingarmiðlar vit í dag kenna best. Eisini eiga vit her at hugsa um, at í dag gongur menningin við rúkandi ferð og ein bók er eftir stuttari tíð avoldað.

Teldan er komin fyri at verða og um nøkur fá ár, verður mett, at hvørt einasta heim hevur eina teldu við internetsambandið og skuldi hetta verið ein frálíkur møguleiki til undirvísing eisini gjøgnum alnótina.

Tey uppskotini eg havi gjørt til møgulig forrit kunnu eisini brúkast í øðrum lærugreinum og leggur hetta sjálvsagt upp til, sum okkara fólkaskúlalóg sigur, at arbeiðast kann tvørfakligt. Hetta eru bert hugskot, bert hugflogið setir mørkini fyri, hvat kann gerast.

Eg havi valt at gjørt royndarforrit við Microsoft Powerpoint, tí hetta er eitt forrit ið longu frammanundan liggur inni á telduni. Sjálvsagt er hetta ikki tað besta forritið, men tað kann sagtans vísa á hvat meiningin við undirvísingarforritinum er.

# Verkætlanararbeiði – uppgávupartur 3 KT

**Ì hesari verkætlanini, havandi í huga at tíðin at arbeiða í ikki er nógv, er realistiskt at seta sær sum mál at**.

1. Leita fram teldutókt undirvísingartilfar í norðurlendskum høpi, greina tað og ummæla eftir hesum kriterium:

    a. Hvønn aldursbólk er hetta ætlað til?
    b. Í hvørjari lærugrein kann hetta brúkast?
    c. Kann hetta brúkast tvørfakligt?
    d. Hvat er endamálið við tilfarinum?
    e. Er tilfarið ætlað sum einstaklingaarbeiði ella bólkaarbeiði?
    f. Er tilfarið lætt atgongiligt?
    g. Er tilfarið lætt skiljandi (lesiligt)?
    h. Hvør hevur gjørt tilfarið (fakbólkur?)

2. Kann funnað tilfarið umsetast til føroyskt? -Í so fall hvat krevst?

    a. Av peningi
    b. Av týðaranum – skal hann vera kønur í onkrum faki e.l.?
    c. Kann tilfarið nýtast beinleiðis til føroyskt viðurskifti?
    d. Ella skal tilfarið gerast um?

Við í hesum partinum hoyrir tað at royndarkoyra okkurt av útvalda tilfarinum við føroyskum næmingum í undirvísingarhøpi.

3. Gera uppskot til hvussu føroyskt undirvísingartilfar kann gerast í frálæruni føroyskt. Hetta tilfarið verður bygt upp soleiðis:

    a) Eitt føroyskt ævintýr verður skrivað
    b) Myndir verða settar til saman við ljóði
    c) Hvussu kann hetta setast í verk og hvat krevst?

Tórshavn 2003

# Telduforrit

## Matemania norskt støddfrøðisforrit

Forritið er at finna í einari royndarversión á netinum adr.

http://www.matemania.no/omoss/spilldemo.asp

Til forritið finnast uppgávur, lærarvegleiðing og fordýpilsi

Í hesum forritinum kanst tú sjálv/ur byggja upp ein figur sera einfalt við at flyta músina og trýsta og punktir inni í einum fýrakanti. Um tú vilt hava at vita støddina á fýrakantinum ella trýkantinum trýstir tú á ein av hjálaparknøttunum til høgru, so verður støddin rokna út.

Tú kanst sostatt máta arealið á øllum kantinum, longdina á einum kanti, vinkulin og tú kanst eisini alla tíðina flyta linjurnar, so tú fært ein annan vinkul, tvs. nýggjar avbjóðingar.

Eftir mínum tykki eitt sera gott programm, sum kann verða næmingunum til stóra hjálp tá ið ræður um at skilja geometriina.

At umseta hetta til føroyskt skuldi ikki verið nakar trupulleiki, tí her er ikki nógvur tekstur.

- Forritið er í løtuni stongt fyri øllum uttan lærarum og næmingum í hægru flokkunum. Háskúlar og lærarar við háskúlar hava høvi at brúka forritið.
- Frá og við 1. januar í ár skal gjaldast fyri Matemania. Licensurin er 200,-no.kr fyri hvønn skúlan umframt 15,-no kr. fyri hvønn næming,
- Við í licensinum liggur frí nýtsla av forritinum fyri øll starvsfólk á skúlanum, fyri næmingar og fyri foreldur í 2004, t.v.s. at næmingar frítt kunnu brúka forritið heima ella í skúlanum og tað skuldi avgjørt verið ein fyrimunur.
- Tað finst eisini møguleiki fyri at tekna seg sum einkultbrúkara, hetta kostar 150,-no. kr. um árið.

- Forritið er bygt upp sum eitt landsskap við ymiskum avbjóðingum á vegnum. Tað kann brúkast tvørfakligt eins væl og bert i støddfrøði, men dentur verður lagdur á at forritið best verður brúkt í støddfrøði og tilevning, tí fleiri av uppgávunum eru gjørdur so.

- Hjá næmingum ber til at fara beinleiðis til eina uppgávu og ikki sleppa víðari fyrr enn uppgávan er loyst, men tað ber eisini til at fara beinleiðis til fordjúpilsisuppgávur.
- Forritið er ætlað øllum næmingum í miðdeildini, eg vildi mett frá 6. flokki upp til 10. flokk.
- Forritið er ikki bert gjørt til hin einstaka næmingin, men er serliga ætlað í flokshøpi, tað vil siga, tað skal vera møguligt at fáa allar næmingarnir í einum flokki at arbeiða við forritinum.
- Forritið er ikki rokna sum eitt fast undirvísingartilfar, men sum framíhjátilfar og tað er eins væl ætlað til foreldur og læraran sum til næmingarnir, verður dentur lagdur á.
- Ætlanin við forritinum er, at tey sum brúka tað, skulu vera aktivt søkjandi og tað leggur beinleiðis upp til samstarv og til at næmingar kunnu arbeiða saman umvegis telduna heima við hús.
- Forritið er miðvíst rætta móti
    1. Statistikk, sannsýnligheitsrokning og spæl
    2. Geometri
    3. Algebra og funtiónslæru

  Tøl, talsystemir, talrokning og talmynstur

**Hetta verður organisera sum variatión millum**

1. Arbeiði við grunnleggjandi kunnleika í evninum
2. Kannandi virksomheit/eksperimentering
3. Fordýpilsi í einstaka evninum.

**Styrkin í forritinum liggur í at næmingar hava møguleika fyri at royna nýggjar hugsunarhættir, at tey fáa skjótt feed back, at tey kunnu fara aftur og gera alternativar royndir.**

Eksperimentering, modellering, hypotesetesting og fordjúpilsi hava ligið langt frammi í huganum tá ið forritið varð gjørt. Samstundis eru øki har ávís roknikynstur kunnu venjast.

**Forritið (læremiddelet) er bygt upp soleiðis**:

1. Problemformulering við teksti um evni, útarbeitt til næmingin
2. Yvirbyggjandi tekstur. Tekstur sum viðger bæði evni og tað sum kann vera knýtt at tí. Hesin tekstur er serliga skrivaður til lærarar, men eisini til serliga áhugaðir næmingar og til foreldur og onnur áhuga.

**Bygt upp í 4 Stigum**

- **Innleiðingarstig**. Probelemformuleringin og lærugreinatilfarið verður lagt fram fyri næmingunum
- **Venjingarstig.** Næmingarnir fáa høvi at venja tað tey duga.
- **Útforsknings og fordýpilsisstig.** Næmingarnir ekperimentera, kanna og fordjúpa seg.
- **Metastig.** Metateksturin er ein tekstur um frálærutilfarið. Tað er leinkja saman til kanningarrúmini og til uppgávurnar, soleiðis at tú við einum trýsti á ein knøtt, kanst koma til metastigið. Har kann brúkarin so fáa frágreiðingar um samanhang, orð og hættirnar. Metateksturin er lagdur í ein dátugrunn. Hesin tekstur kann vera ein stór hjálp.

## Frukt- og grønthandlarin

Tá ið tú trýstir á eina av myndunum, t.d. frukt og grønthandlaran standa myndirnar ikki stillar, men krambakallurin, sum stendur innan fyri diskin fer eftir fruktunum, sum kundin vil hava, setir tær á vektina og vigar so, lodd í aðra skálina og frukt í hina til tað stemmar við tað kundin vil hava. Tá ið vektin javnvigar, gevur krambakallurin

kundanum fruktirnar og hann spyr hvat tær kosta, drongurin skal nú rokna út hvat t.d. ein annanas kostar.  Á einum skelti stendur at tær kosta 20,-kr kilo.
80,-kr verða skrivaðar í ein punt og nú sigur kundin t.d. at hann  hevur 200,-kr, drongurin skal nú rokna út hvussu nógv kundin skal hava aftur.

Aðrir kundar koma inn og vilja keypa aðrar fruktir og soleiðis kanst tú halda fram. Her verður eisini hugsa um støddir á fruktunum, summar eru smáar, aðrar millumstórar og aðrar aftur stórar og drongurin má tí gera so sum kundin vil hava tað.
Tá ið ein kundi hevur verið og keypt, síggjast fleiri kundar ganga framvið og so steðgar hin næsti meðan drongurin veittrar.
Avgjørt vert at royna.
Myndirnar eru litríkar og klárar.

## Eurohandil

Í forritinum er eisini ein Eurohandil, so næmingarnir kunnu læra um gjaldoyru. Tey fáa at vita hvussu nógv ein euro er í mun til eina norska krónu og so kunnu tey fara inn í ein handil at keypa fyri t.d. 2600 kr.
Trýstast skal á bíligastu vørurnar, veljast kann millum euro og krónur og so fara tær í ein innkeypsvogn, sum ein drongur gongur við. Tá ið farið verður til kassan verður møguliga funnið útav, at ov nógvar vørur eru í kassanum og at drongurin ikki hevur nóg mikið av peningini. Nú verður spurt um hann vil royna aftur og hetta kann gerast fleiri ferðir til drongurin at enda hevur lært at hann bert skal taka tær bíligastu vørurnar og alla tíðina hugsa um hvussu nógv hann hevur at keypa fyri í euro í mun til krónur.
Uttan iva eitt spæl nógvir unglingar kunnu fáa tíðina at ganga við og samstundis læra nógv av.

## Eydnuhjól

Har tú kanst velja ein hjálpara og ein stjóra, tú kanst eisini lata tey í onnur klæði, so fer spælið í gongd og gongur út uppá at rokna út hvussu stórir møguleikarnir eru fyri at vinna tá ið ein keypir ein lutaseðil ella fleiri.
Hetta gongur út uppá at læra seg at rokna út hvussu stórir vinningarmøguleikarnir eru í einum eydnuhjólið.

## Góðgætisverksmiðja

Her verður byrja við at søkja eftir einum at arbeiða á verksmiðjuni, hann skal í læru fyri at koma víðari. Hann fær at vita tilgongdina á fabrikkini, t.d. hvussu nógv bomm skulu í hvønn posa og hvussu nógvir posar skulu í hvørja erskju. Hvussu gógvar erskjur ganga í ein lastbil, hvussu nógvar lastir í eitt skip o.s.frv.

## Origami

Soleiðis eitur ein verkstaður og her eru fleiri valmyndir, ið vísa hvussu tú kanst gera bátar, flogfør, dýr, koppar og annað úr pappírið.
Tekningar eru til og er hetta sera áhugavert. Tú kanst sum brúkari sjálv avgera hvussu skjót ferðin á arbeiðinum skal vera, tí er hetta avgjørt eisini fyri næmingar, ið skulu brúka eitt sindur meira av tí  enn onnur fyri at skilja mannagongdirnar. Heilt greitt ein innfalsvinkul til lærugreinina tilevning.
Her eru eisini putlispøl og litspøl, ið skifta lit um tú trýstir á ymsar knøttir.

## Niðurstøða

Hetta forritið hevur óteljandi møguleikar og brúkast kunnu dagar upp á tað. Avgjørt vert at royna og møguliga umseta til føroyskt, tí tað er einki, ið forðar fyri tí.
Støddfrøði er tann sama óansæð landafrøði. Tað er sera brúkaravinarligt, við tað at skermmyndin kann gerast størri. Forritið er sum eg havi skilt alla tíðina undir menning, tí virka nakrir av knøttunum ikki tá ið trýst verður á teir.

Hetta er avgjørt eitt forrit, ið eisini talar til tey sum ikki dáma so væl at rokna, tí alt er bygt upp sum spæl.
Forritið er sera viðkomandi við tað, at tað er nýtt og er ætlað serliga til tvørfakligheit. Tað virkar spennandi og avbjóðandi fyri øll vildi eg mett.

Myndirnar hevur Mauricio Pavez gjørt og eru teir eisini sera væl gjørdar og nútíðarhóskandi. Tað er ein Lucky Luke stílur vyri myndunum, sum ger tær stuttligar og áhugaverdar fyri ung.
Fyri at kunnað nýta forritið krevst flash versjon 5 eller nýggjari.
Forritið finst fyri mellomtrin og Ungdomstrin og finst bæði á nýnorskum og á bokmål.
Matemania er gjørt fyri Caspar Forlag/HiB-Mediesenteret 2003 í Noregi. Um onkur er áhugaður er e-mail adressan: matemania@caspar.no

## Dagbladet i Dag

Danskt forrit. Trídimensionelt, har tú kanst fara við músini inn á eina blaðredaktión og síggja alt sum fer fram frá tí blaðið verður skrivað til tað kemur út.
Forritið er sera ringt at koma inn á og tað er torført at stýra við músini, við tað at tú í heilum endar onkra aðra staðni enn tú hevði ætlað tær.
Harafturat fæst lítið og einki at vita um nakað inni á redaktiónin í mun til um tú fór inn á t.d. Sosialin. Tey, sum tosa eru deydlig, stillmyndir og ræddirnar eru stívar, tey tosa sum um tey lósu úr einum brotið, hóast hetta skal eitast at vera livandi mynd.
Finst á Uni C CD.

## Lesehulen

Norskt programm og er útvikla av tí sama sum hevur hevur gjørt Matemania. Eitt ógvuliga spennandi og læruríkt programm. Forritið er ætlað at økja um og menna lesihugin hjá børnum.

Fyrsta valmyndin er eitt ævintýrríki. Í ævintýríkinum kanst tú velja ymiskar bøkur við at klikkja á har hondin kemur fram. Um tú t.d. trýstir á stjørnuna, kemur fram eitt ævintýr. Tú kanst eisini trýsta á ein úlv ella á eitt gamal slott, og hvørja ferð fært tú eitt nýtt ævintýr inn. Á henda hátt kanst tú velja tær tað tú hevur áhuga fyri.
Tá ið tú so hevur valt bókina, tú fegin vilt hoyra meira um, fært tú aftur ein valmøguleika.
Tú hoyrir ein upplesara, um tað er eitt ævintýr, siga frá einum parti av ævintýrinum, og meðan tú lurtar, kanst tú leggja eitt putlispæl, og her hevur tú eisini ein møguleika fyri at velja ímillum fleiri.

Putlispælið er uppbygt soleiðis, at tað bæði er fyri roynd, ongar strikur at leggja eftir og fyri óroynd, strikur at leggja eftir. Tá ið tú hevur lagt putlispælið rætt skiftir myndin lit og tú sært nú myndina í teimum litum sum eiga at vera. Um tú hevur áhuga, kanst tú leggja fleiri putlispøl.
Sera vælegnað til at føroyska bert við føroyskari talu og teksti.

Trýstir tú á eina aðra valmynd, fært tú eina aðra bók fram. Hetta kann t.d. vera bókin um bróðurin, ið misti systrina hann hevði verið so góður við eftir einari nátt, tí hon knappliga gjørdist kend sum poppstjørna.
Eisini her eru aktivitetir tú kanst fara í holt við. Tú kanst t.d. hoyra sangin systirin er vorðin kend uppá.
Ein valmynd kemur fram við øllum orkestrunum, framman fyri pallin situr ein stór áhoyrarafjøld og klappar og veittrar.
Tað sum er áhugavert og genialt her er, at tú sjálv kanst velja hvør spælir nær, t.d. kanst tú byrja við einaum gittara, lata hann spæla eina løtu og síðan halda fram við bassinum, síðan við trummunum og ljómborðinum og at enda kanst tú lata sangarinnuna koma framat eins og í veruleikanum. Meðan tú hoyrir sangin kanst tú lata okkurt av ljóðførunum falla út og koma inn aftur.
Sera áhugavert. Her kanst tú eisini litleggja eina dukku og klæði hennara. Dukkan er sjálvsagt systirin, ið er vorðin poppstjørna.

Til  ber eisini til at leita eftir einari ávísari bók. Tað gert tú við at trýsta á valmyndina leita. Eitt grønt blað á einari grein kemur fram og har stendur **-Skriv søkeord her**.-

**Einfalt bygt upp**

Lesehulen er sera einfalt upp bygt. Byrjunarvalmyndin er ein reyð mynd við einari einfaldari tekning av einum træ við fáum greinum, uppi yvir sveimar ein summarfuglur, sum ávíkavist setir seg og lættir sær  av greinini, meðan teljarin telur til null.

Tónleikur er alla tíðina at hoyra meðan valmyndin er frammi, hetta er lættur elektroniskur tónleikur.

Sum sagt fylgja ymiskir aktivitetir eisini við forritinum og ein av teimum er ein tekning, eitt landslag har tú kanst velja ein figur og seta hann inn, um teir ikki venda rætt, hevur tú møguleika fyri at venda teimum við pílum.

Forritið er gjørt við tí fyri eyga, at børn í aldrinum 10-12 ár skulu fáa áhuga í at lesa eina norska bók. Tey verða á ein spennandi og kreativan hátt leidd inn í bókina við ymiskum tiltøkum, soleiðis at tey fáa áhuga í at lesa bókina. Forritið er eisini ætlað sum ein leitimaskina eftir einari góðari norskari bók.

Tú kanst eisini trýsta á eina valmynd við heimskortinum, tó eru Ísland, Føroyar og Grønland ikki við.- Á hesari valmyndini hevur tú møguleika fyri at velja ímillum fleiri útlendskar bøkur, ið eru týddar til norskt við at klykkja á ein aktivan knøtt.

Í ævintýrinum um Venezia mysteriet, hevur tú møguleika fyri at spæla eitt sera spennandi spæl, har tú skalt fanga tjóvarnar í báti. Tú skalt stýra við pílatastunum og ein spennandi jagstran byrjar. Í einari lítlari mynd við síðuna av kanst tú síggja hvar tú ert og hvar tjóvarnir eru, har kanst tú eisini síggja um aðrir bátar eru nærhendis, so tú ikki renur á teir. Á vegnum eru forðingar, s.s dunnur, gongdolir, pelar o.a., hetta skalt tú royna at stýra uttan um. Tónleikurin er dramatiskur og setur gongd í adrenalinið.

Um tú ikki megnar at fanga tjóvarnir beinanveg verður sagt frá og tú hevur møguleika at byrja um aftur. Við hesum møguleikanum er gjørligt hjá øllum børnum bæði teimum, ið er skjót og hjá teimum, ið krevja meira tíð at fáa nakað burtur úr. Tá ið tú kemur fram at bátinum við tjóvunum í, kemur ein politibilur fram við landi og tú fært at vita at tú hevur fanga tjóvarnar.

**Forritið skuldi verið sera væl egna at gjørt um til føroyskt**. Sjálvandi ber tað ikki til bert at umseta alt forritið, tí hetta er gjørt við atliti at norskum barnabókmentum. Men einki skuldi verið til hindurs fyri at gjørt eitt líknandi forrit á føroyskum, við teimum mongu góðu barnabókunum vit hava bæði á upprunamálinum og týddu bókunum.
**Ætlanin aftanfyri forritið, er gjørt við tí fyri eyga at fáa børn at lesa fleiri bøkur**. Eg meti heilt avgjørt at hetta endamálið er rættiliga realistiskt, tí í dag finst so nógvur aktivitetur har børn kunnu luttaka bæði uttandura og innandura meðan bøkurnar koma í aðru røð.
**Børn í dag hava nógvar og fjølbroyttar avbjóðingar**. Uttanduraaktiviteturin er sunnur og har skal einki broytast. Men øll tey mongu telduspølini og allar kanalirnar í sjónvarpinum sum tey dag og dagliga kunnu sleppa framat er ikki bara mennandi, hóast tað eisini er gott til sína tíð. Men ikki kann sigast, at hetta stimbrar undir lesihugin hjá børnunum og tí meti eg at eitt tílíkt forrit hevði verið gott at fingið út til so nógv børn sum gjørligt, til tess at fremja um lesihug teirra, tí tað skerst ikki burtur, at fleiri kanningar hjá OECD vísa, at lesingin er fyri einari niðurgongd í løtuni og alt fleiri analfabetar síggjast millum ung í Vestureuropa, kanska serliga í Danmark, sum vit ofta sammeta okkum við.
Her skal skoytast uppí, at finsk børn sigast vera millum tey, ið duga best at lesa og júst finnar brúka nógv henda hátt við at gera børnini áhuga í bókini við ymiskum tiltøkum áðrenn tey byrja at lesa bókina.

Tíverri eru sjáldan bert fyrimundir við einum forritið, og ein vansi við hesum forritið má nevnast  og tað er sambandið. Fyri at kunnað luttaka í hesum forritum krevst eitt skjótt internetsamband, so tað er ikki nóg mikið við uppringdum sambandið sum flestu føroyingar hava um vit skulu sleppa framat forritinum gjøgnum netið. Søgurnar verða avbrotnar og bíðast má alt ov leingi eftir næstu valmynd.

Men roknast kann við at við tíðini verður hetta broytt so hvørt sambandið gert skjótari. Forritið kundi sjálvsagt eisini verið brent inn á fløgu og selt.
Eg havi fingið at vita frá teimum, ið gjørt hava hesi forrit, at tey heldur enn fegin vilja hjálpa til, við at fáa forritini týdd til onnur mál, so tað átti ikki at verið so kostnaðarmikið at týtt tey.

# Undirvísingartilfar

## Kvæði

Føroysk kvæði eru sera vælegnaði sum undirvísingartilfar í teldutøkum høpi. Tey viðgera serstøk evni og eina serstaka tíð, tey eru ævintýrkend og ørindini eru nógv. Flestu teirra siga frá einari stórari søgugongd, sum ofta hevur havt støði í veruleikanum.
Tað sum eisini sermerkir kvæðini er, at fleiri teirra finnast á øðrum málum við, antin sum ævintýr, søga, kvæði ella sum vísa.
Taka vit t.d. støði í Hørpurímu, sum er sera vælegnað sum undirvísingartilfar í fleiri lærugreinum, er eitt ótal av møguleikum.
Ævintýrið um tær tvær systrarnar í Hørpurímu finst í øllum Norðurlondum sum vísa, kvæði ella sum ævintýr. Men ikki nóg mikið við tí, tað finst eisini í Baltisku londunum og á Arabisku hálvoynni.
Kvæðið kunnu flættast inn í fleiri lærugreinir. Føroyskt (kvæðamentan), landalæra (sama kvæði finst á fleiri ymsum málum), tilevning, tónleik.

Hetta kvæðið kundi verið flættað saman við øðrum kvæðum í einum forritið, t.d. einum, ið er bygt upp á sama hátt sum norska "Lesehulen" Hetta forrit er ætlað at menna um lesihugin hjá børnum og soleiðis kundu vit eisini ment um áhugan fyri føroysku kvæðamentanini. Bakgrundstónleikurin kann vera føroyskur dansur ella ein nýggj útseting av føroyskum kvæðum, s.s. fleiri orkestur hava gjørt tað í seinastuni.

Kvæðið kundi verðið umskrivað til eitt ævintýr um tær báðar systrarnar við so ymiskum sinnalag, sum í síðsta enda avgjørdi hvør lagna teirra bleiv.
Ævintýrið verður lisið inn á fløgu. Og kvæðið Hørpuríma verðið kvøðið.
Uppgávur verða gjørdar til rímuna. Hetta kunnu vera sera fjølbroyttar uppgávur.

1. Finn útav í hvussu nógvum londum Hørpuríma finst? – hetta krevur sjálvsagt at næmingurin hevur internetsamband og at hann veit hvørji orð hann skal sláa upp á alnótini. Hetta hevur lærarin sjálvsagt greitt næmingunum frá áðrenn farið var í gongd.
2. Ber til at finna útav, hvussu langt aftur Hørpuríma røkkur, tvs. í hvørjari øld søgan fyrstu ferð er hoyrd. –Hetta kann gerast við at næmingurin, tá ið hann hevur funnið ævintýrið ymsa staðir, kannar eftir nær tað fyrstu ferð var at hoyra.
3. Ger myndir til hvørt ørindi? – hetta kunnu vera tekningar fyri smærri børn, málningar fyri størri børn ella okkurt heilt annað tilfar.
4. Putlispøl
5. Dramatisk spøl o.a.

Tá ið næmingurin er liðugur at viðgera ymist sum forritið leggur upp til, kann farast í gongd við at lesa kvæðið og venja tað.
Sí annars ummælið av Lesehulen.

# Teldutókt undirvísingartilfar

**Her havi eg valt at skriva eitt ævintýr um fýra villdunnungar, ið verða rændir frá mammuni av nøkrum børnum í gáloysni. Ungarnir yvirliva tí ein vaksin tekur sær av teimum og veit hvussu teir skulu handfarast.**

Forritið er gjørt í Power Point, sum sjálvsagt ikki er tað ein skal nýta um tað skal vera eitt undirvísingarforrit, tí tað begrensar rættiliga nógv. Skalt tú gera eitt tílíkt undirvisingarforrit krevst at tað er gjørt til hetta. Ljóðgóðskan skal vera góð, eins og myndagóðskan. Tað skal kunna skifta skjótt, tí gongdin skal stýrast av brúkaranum. Hvat undirvísingarforrit hevði verið best at brúkt er torført at meta um, tí tað veldst um hvønn aldursbólk hugsað verður um.

Um vit hugsa um smærri børn skal forritið kunnað klára at orðini kunnu endurtakast ferð eftir ferð, so hvørt sum trýst verður á orðið. Harafturat vildi eg mett at tað hevði verið týdningarmikið at til bar at tekna myndir til søgugondina og myndirnar kundu síðan verið goymdar inni á einari mappu hjá næminginum. "Den Talende bog" hevði verið góð til hesa undirvísingargongdina. Hetta forrit hevði verið hóskandi frá 2. – 3. flokk.

Ein tílík søgugongd kann eisini nýtast til eldri næmingar 3.-5. flokk. Her kundi ein tikið aðrar lærugreinir uppí. Tað kundi t.d verið:

1. føroyskt
2. náttúra og tøkni
3. Tilevning
4. tónleik

Kundi hugsað mær at ævintýrið varð lisið inn í forritið við plássið fyri tekningum og møguliga eisini fotomyndum, sum næmingar sjálvir høvdu tikið úti í náttúruni t.d í náttúru og tøkni.

Hvørjar uppgávur kundu hugsast at verið gjørdar til eitt tílíkt forrit?

**Náttúra og Tøkni**

1. Hvar liva villdunnur – liva tær alt árið í Føroyum?
2. Hvussu liva tær og nær eru tær kynsbúnar?
3. Hvussu nógv egg verpir villdunnan?
4. Halda somu villdunnur saman alla sína tíð?
5. Sæst munur á bøgu og steggja?
6. Hvussu leingi liva villdunnur?

Tað kundi verið so mangt annað spurt varð um, bert hugflogið setur mørkini.

**Føroyskt**

1. Søgan verður lisin í flokkinum sum lesibók
2. Lesiveikir næmingar fáa fløguna heim við at lesa
3. Uppgávur
4. Tekna myndir til ævintýrið
5. Við støði í tínum egna djórið: skriva sjálv eitt ævintýr og set myndir til

**Tilevning**

**<u>Vit arbeiða við ævintýrum</u>**

1. Lærarin lesir søguna fyri næmingunum
2. Næmingarnir lesa søguna sjálvir, (hjá teimum, ið ikki duga at lesa, ber til at trýsta á lúðurin, so verður lisið fyri teimum)
3. Kenna tit líknandi ævintýr?
4. Hevur nakar av tykkum djór heima?
5. næmingarnir antin einsamallir ella í bólkum gera myndir til søgugongdina á stórar plansjur
6. Málningar til ævintýrið
7. Plansjur verða gjørdar og hongt verður upp

**Tónleik**

1. Far inn á alnótina og leita eftir tónleiki, ið møguliga hóskar til ævintýrið
2. Finn sangir, ið hava nakað við evni at gera í sangbókum og møguliga á nótini? – Lærarin kann geva teimum leitorð.
3. Gera sangtekstir burturúr ævintýrinum
4. Set lag til
5. framfør antin live ella við tínum egna forritið.
6. Skriva sjálv eitt ævintýr, tak fotomyndir til, klipp úr bløðum, tekna ella mála myndir til ævintýrið. Framfør.

Um forritið kemur at síggja út soleiðis sum tað ger nú kann tað ikki brúkast til rættiliga nógv annað enn lesiveikar næmingar og til yngri næmingar, so tað er avgjørt neyðugt at uppgávur av ymsum slag verða førdar til.

## Myndlist

Tilevning er ein lærugrein ið bæði er í barnaskúlanum, framhaldsdeildini og á studenta og HF skúlanum og ofta haldi eg hon verður rættiliga nógv niðurprioritera, í øllum førum í barnaskúlanum, har hon nú er vorðin ein partur av fleiri øðrum lærugreinum og nevnist: handaverk og list. Orsøkirnar til hetta kunnu sjálvsagt vera nógvar, men ein av orsøkunum meti eg er væntandi undirvísingartilfar.
Soleiðis nýtist tað als ikki at vera. Føroyar eru sambært útlendskum serfrøðingum ta landið, ið hevur flest listafólk og listaverk sammet við fólkatalið og at vit eiga nógv evnarík listafólk her á landi, ið børn og ung eiga at hava møguleika til at koma at kenna nærri, kann ikki diskuterast. Í Føroyum eru fleiri audiodakt listafólk, tvs. fólk, ið eru sjálvlærd, men vit hava eisini listafólk, ið hava verið undir útbúgving sum listafólk aðrastaðir í heiminum.

Áhugin fyri listini kemur aloftast í barndóminum og tað er eisini her vit eru best til at menna okkara evni innan bæði myndlist og tónlist.
Tí meti eg tað vera av alstórum týdningi, at skúlarnir bjóða næmingunum eitt nógv størri útboð enn gjørt verður nú. Hetta kann gera teir førar fyri at menna síni egnu evni nógv fyrr enn áður og summi vilja á henda hátt velja sær eina lívsleið innan kreativ fak fyrr enn gjørt verður nú.

Eg havi í hesum sambandi fylgt einari føroyskari listakvinnu, Rannvá Mortensen av Tvøroyri á árligu Várframsýningini í Listaskálanum í fjør og í ár, tikið myndir við digitalkamera og verið heima hjá henni og tikið myndir av øðrum myndum hon hevur. Tosa við hana og fingið hana at greitt frá hvat hon tekst við og hví. Hetta hevur alt í alt verið ein sera spennandi tilgongd.

Eisini havi eg gjørt henni eina faldara hon kann nýta at profilera seg uttanlanda við, men hetta er eisini ein faldari skúlin kann brúka í sínari undirvísing. (Faldarin er gjørdur í Publisher og er viðlagdur uppgávuna.

Burturúr hesum rúgvusmikla tilfarið kundi eg hugsað mær at teldutókt undirvísingartilfar varð gjørt burturúr. Hetta forrit kundu næmingar í framhaldsdeildini og í Miðnámsskúlunum brúkt í sínari undirvísing.
Um forritið skal verða fullfíggjað skuldu møguliga fleiri føroysk myndlistafólk við, men tað er avgjørt ikki neyðugt.
Hvussu eitt slíkt forrit skal byggjast upp er torført at koma við uppskotum til við so knappari tíð. Kanska kundi danska forritið “Dronningens Gobeliner” kunnað givið íblástur til eitt tílíkt forrit.

Men bert tað at allar myndirnar vóru savnaðar saman á einari fløgu, saman við frágreiðingini hjá listafólkinum og tilfarslistanum hon hevði brúkt kundi givið íblástur til mangt og hvat.

Rannvá greiðir sjálv frá hvør hon er, hvat fekk hana at mála og nær hon byrjaði. Hví hon málar og hvat fær hana at halda fram. Hon greiðir frá hvørji materialir hon hevur brúkt og hví hon brúkar tey, (her skal viðmerkjast at stundum verða rættiliga óoriginal evni brúk, s.s. eggjablommur, ávísar plantur til at fáa ein ávísan lit, øska, penslar, fingrar, stempul, fotomyndir til kollagir, toystykkir til ávís mynstur, ávísir o.m.a. Harafturat kundi hon greitt frá, hvat skal til fyri at kunnað liva av hesum yrki burturav og um tað yvirhøvur ber til at liva av hesum í Føroyum.

**Ein undirvísingargongd kundi t.d. verið:**

1. Hví hevur listafólkið valt at rópa røðina Umskapan?
2. Set sjálv navn á hvørja mynd
3. og royn við orðum at siga frá hvat tú heldur myndin er um.
4. Hvørji materialir heldur tú listafólkið hevur nýtt?
5. Kundi t.d. ein søga verið skriva ístaðin
6. Bið listafólkið koma at greiða frá
7. Far inn á www.art.fo og leita eftir listafólkinum, hvat stendur har um hana og hvørjar myndir eru á heimasíðuni.
8. Far at enda í Listaskálan ella har sum listafólkið stillar út og hygg eftir framsýningini

Forritið kann eisini byggjast upp soleiðis, at næmingarnir fáa høvi at hyggja eftir øllum myndunum sum diasshow, kanska við tónleiki.
Síðan kunnu teir velja sær eina og eina mynd at greina. Td. Kundu spurningarnir verið:

1. Hvat sigur henda myndin tær
2. hví heldur tú hon hevur málað hana?
3. Hvat sigur hon sjálv um myndina
4. Hvørjar litir brúkar hon?
5. Hvat sigur hon sjálv um hvørjar litir hon brúkar?

Møguleikarnir eru óendaligir og bert hugflogið setir markið.
Tað sum fáast kann burtur úr at arbeiða við tílíkum tilfarið er ógvuliga mennandi fyri hvønn einstakan næming og skuldi givið nógvan og góðan íblástur til sjálv at fara í gongd við at skapa nakað.

## Eftirmeting

tá ið eg fyri rúmum árið síðan fór í holt við uppgávuna, setti eg mær mangt og hvat fyri. Ætlaði mær at kanna fleiri útlendsk forrit og ummæla tey, men seinni havi eg funnið útav, at hetta kanska ikki var so heppið, tí øll tíðin fór at fara við hesum og eg hevði eisini sett mær onnur mál. Harafturat eru tað fleiri okkara á telduvarðaútbúgvingini, ið hava gjørt frálík ummæli av útlendskum forritum og so hugsaði eg, at tað kanska var nógv betri og minni tíðarspilla, um eg savnaði tey øll saman og setti tey sum hjátilfar í mína uppgávu. Hetta havi eg so partvís valt at gjørt og finnast fleiri ummæli viðheft hesari uppgávu.
Sjálv havi eg hugt eftir fleiri ymiskum forritum og havi bert valt trý teirra út, hesi eru við í uppgávuni. Annars eru link til fleiri góð forrit í tilfarslistanum, hesi havi eg hugt at, men valt ikki at tikið við.

Eg havi gjørt nøkur uppskot til hvussu føroyskt undirvísingartilfar kann gerast, tí at fara at gera tilfarið sjálv er alt ov krav- og møtimikið, tað tekur langa tíð og hetta eigur ein programmørur at standa fyri.

Søguna um "Villdunnurnar" havi eg skrivað og sett saman við ljóðið í Power Point og meti eg sjálv hetta hevur eydnast væl. Fotomyndirnar havi eg tikið fyri nøkrum árum síðan og skanna inn á telduna. Næmingar í fyrsta flokki hava lurta eftir søguni og tekna myndir til. Nøkur av teimum, ið eru best fyri hava sjálv roynt forritið.

Ætlan mín var upprunaliga at næmingar eg havi í Hoyvíkar skúla skuldu sleppa at royna nøkur útvald forrit, men hetta miseydnaðist. Einamest tí eg legðist mest eftir Matemanina, norska støddfrøðiforritinum og eg havi í ár ongan flokk havt í støddfrøði. Tað hava heldur ikki verið stundir til at royna nakað serligt við næmingunum. Tíðin hevur heilt einfalt ikki strekt til og atgongdin til teldurnar hjá øllum næmingunum í skúlanum er langt frá góð nokk. Neyðugt er at skriva seg inn á teldurnar og teldur eru heldur ikki til allan flokkin. Um ein tveylæraraskipan var, hevði møguliga verið lættari, tí so kundi annar lærarin havt eina helvt og hin eina aðra. Men alt í alt haldi eg uppgávan hevur eydnast og at málsetningurin er rokkin.

**Bóka- og tilfarslisti:**


- http://www.projektopgaven.dk/
- Ringe i vandet. Frank B. Jensen. Orfeus 1999
- IT-vejlederens håndbog. Bent Jensen. Kroghs Forlag 2002
- Fra kontrol til kaos. Kristen Ehrhorn, F.B. Jensen. Orfeus 1997
- Læsning og EDB. Bent B. Andresen. Orfeus 1996
- Skolen i tiden. B. Andresen. Kroghs Forlag 1999
- Dátusøvn
- Umframt hópin av heimasíðum um undirvísingarforrit og annað gott

Leinkjur:
http://www.matemania.no/omoss/spilldemo.asp
www.gobelin.dk.url
http://mmb.ls.no/
http://www.allemansdata.se/
http://www.skolemedia.dk
http://islam.skolemedia.dk/
http://www.elke.dk/demo-talboerge.htm
http://skolenettet.ls.no/programvare/vindusrekka/
http://www.hist.uib.no/digitalskolen/
http://skolenettet.ls.no/imaker?id=29307&malgruppe=0&trinn=0&omr=29307&mal=hovedomrade
http://www.earmaster.com/download/
http://www.forbrugertryghed.dk/loms/design/framesets/index.asp
http://www.undervisningsavisen.dk/
http://www.mikrov.dk
http://www.musit.com/
http://www.skolevejr.dk/login.asp
http://home.hib.no/mediesenter/hvaharvigjort/index.html
http://www.zmekk.no/
http://www.kulturskolesekken.no/
http://www.lesehulen.no/

## Viðhefti:

- Faldari um listina hjá Rannvá Mortensen í Publisher
- Uppskot til forrit –villdunnunar – í Power Point
- Ævintýr skrivað í word –søgan um teir móðirleysu villdunnuungarnir-
- Hestarøð –myndlist í Power point – Rannvá Mortensen
- Um Ránnvá Mortensen – word skjal
- Om lesehulen
- Ummælir av telduforritum